


www.oljan.fo

**Jan Müller** 10 - 04 - 2013

# Føroyar - eitt land í Arktis - á breddan

Á várið 2012 tók løgmaður stig til at gera eina útgreining, ið lýsir hvønn týdning broytingarnar í arktiska økinum væntandi fáa fyri Føroyar. Føroyar liggja væl fyri við vestara munnan á landnyrðingsleiðini, ið verður mett at verða ein siglingarleiði, sum fær stóran týdning komandi árini. Vaksandi virksemið í arktiska økinum hevur stórar búskaparligar møguleikar við sær, men eisini avbjóðingar viðvíkjandi umhvørvi og trygd. Útgreiningin er ætlað sum grundarlag undir einari breiðari politiskari viðgerð av støðu Føroya í Arktis, og hvussu Føroyar á bestan hátt fyrireika seg til nýggju umstøðurnar. Dentur verður lagdur á millumtjóðasamstarv,vinnu, umhvørvi og gransking í arktiskum høpi. Løgmansskrivstovan hevur staðið fyri arbeiðinum við útgreiningini. Ein bólkur við serfrøði úr vinnulívi, granskingarumhvørvi og almennum stovnum hevur veitt ráðgeving í sambandi við arbeiðið. Í ráðgevandi bólkinum vóru: Marita Rasmussen, Vinnuhúsið, Jan Müller, Faroese Oil Industry Group, Annika Sølvará, Granskingarráðið, Ólavur Gregersen, Syntesa, Jákup Mørkøre, Fiskimálaráðið og Vilhjálmur Gregoriussen, Vinnuháskúlin. Útgreining, ið hevur heiti Føroyar eitt land í Arktis verður handað løgmanni á tíðindafundi hósmorgunin 11. apríl kl. 9.00 á Løgmansskrivstovuni.